HOYVÍKSHØLLIN
DYSTARSKRÁ 1 / 2021

H71

LEYGARDAGUR
DATO: 18. DESEMBER

sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
WENZEL.FO
BONUS
INTERSPORT
BYGMA BALSLEV
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ VID STROND 4

H71 NEVND

Anna Dam, forkvinna
tel 519082 - annadam@bvs.fo

Eyðun Joensen
tel 792640 - eyjo@taks.fo

Ann-Mari B. Mouritsen
tel 214452 - ann-mari@olivant.fo

Emy Sólvitsdóttir
tel 513769 - emys@olivant.fo

Sonja Mørkøre
tel 223663 - sonjamorkore@gmail.com

Ivan Fossabrúgv
tel 239611 - ifossabrugv@gmail.com

Rene Dahl Olesen
tel 235930 - renedahlolesen@gmail.com

Annika á Steig Egholm
tel 591319 - annikasteig@hotmail.com

Símun Poulsen
tel 517220 - simun@vh.fo

SO VÓRU VIT AFTUR

Hóast vit longu eru komin mestsum í helvt við kappingarárið, er hetta fyrsta leikskráin í vetur. Nú er hon talgild og finst á heimasíðuni og á Facebook og Instagram. Møguliga onkur leikskrá seinni verður prentað.
Hetta er enn eitt spennandi kappingarár, men – í skugganum av koronu – noyddust vit tíverri at avlýsa Neon Cup, sum børnini hava glett seg til, men kappingin verður, so skjótt tað letur seg gera.
Bæði ítróttarliga og fíggjarliga er árið avbjóðandi, men við góðari hjálp frá okkara stuðlum ber tað til. Og ikki verri, um tit stuðla okkum við at keypa alt fýrverkið í ár frá H71…
Gleðilig jól og gott nýggjár!

Anna Dam
forkvinna í H71

FÝRVERK

Í HOYVÍKSHØLLINI

UPPLATINGARTÍÐIR:

Mikudagin	29-12-2021:	12.00-20.00
Hósdagin	30-12-2021:	12.00-20.00
Fríggjadagin	31-12-2021:	10.00-16.00

H71

HELGI HILDARSON HOYDAL / Trok.fo

BEINA KÓS Í HÁLVFINALURNAR

Um vit hoyvíkingar ikki eru nøgdir nú, verður tað aldrin. Kvinnurnar hava mist eitt stig í SMS-deildini, og hava skrivað søgu við at vinna seg tvær ferðir víðari í Evropa. Mennirnir hava mist tvey stig, og hava sett seg rimmarfast á toppin. Hartil var avrikið í Evropa gott.

H71 er hjá teimum flestu favorittur bæði í Burn- og SMS-deildini, men tað ræður um at vera hvassur og til staðar, tá tingini skulu avgerast. Seinasta kappingarár tóku strandakvinnur meistaraheitið, hóast bara vóru fjórðbestar í grundspælinum.

Kvinnurnar taka stór fet

Frá at hava verið eitt mansdominerað felag á vøllinum, telur flaggskipið nú bæði bestu liðini í felagnum. Kvinnurnar hava so at siga spælt eitt perfekt kappingarár higartil. Vunnið tvær ferðir í Evropa, og bert tapt tað eina stigið í SMS-deildini. Mong vænta og krevja óivað, at tær skulu í FM-finaluna og steypafinaluna í ár, hóast mótstøðan vaksandi. Stjørnan tekur seg fram og Kyndil vinnur á øllum uttan H71 …enn.

Hóast okkara lið bara telur ungar leikarar, eru royndirnar eisini har. Eitt nú Maria, sum hevur skotið fleiri hundrað mál í bestu deildini, heldur eitt framhaldandi høgt støði í sínum spæli. Og so hevur liðið ein ógvuliga royndan venjara í Inga og eitt frískt lot í Mark.

Mennirnir hava skift gir

Tað er ikki tí teir lógu í frígir fyrr í kappingini, men kanska heldur, at orkan bleiv brúkt ørðvísi. Nú er klárt at heysta fruktirnar, og tað gera Simon og Petur væl. Eftir at hava brúkt nógva orku í Evropa-dystunum ímóti Drammen, hava menninir gjørt reint borð við sannførandi avrikum. Og eftir skelkandi stórsigurin í Kollafirði, munnu mong hava H71 sum favoritt at fara við øllum.

Simon og Petur hava eitt luksusproblem fram um aðrar venjarar, tí tá dómaraseðilin verður skrivaður, sleppa hvørja ferð leikarar við góðum evnum ikki við. At hava brúkt metnógvar leikarar higartil og vera nummar eitt og bert hava tapt tann eina dystin, sigur nógv um stóru breiddina.

Hvat siga tølini?

Tølini siga, at tey bæði bestu liðini í løtuni eru í Hoyvík, tí bæði kvinnurnar og menninir hava flest stig, skora flest mál í miðal hvønn dyst og hava besta málmun.

Ikki minst sær breiddin út til at vera størri, tí toppskjúttarnir finnast hjá hinum liðunum, meðan málini hjá H71 eru deild javnari út á alt liðið.

Alt hettar saman bendir á eitt: Í vár skulu hoyvíkingar í bæði SMS- og Burn-deildini hava heiðursmerki um hálsin. Hvussu nógv og av hvørjum slagi, er ikki til at vita, men tað hevði verið løgið, um tey ikki verða gull.


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SISU
SKORA
VIÐ
SISU

Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartídir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

AnnaJanni

FOKUS

18:29

Lætt og stuttligt

Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

BANKNORDIK

Vinn eina persónliga venjing
- fyri teg og ein vin

Lær at finta sum

Elias á Skipagøtu

Hitt A-landsliðið

Eftir venjingina sleppa tit at heilsa uppá føroyska A-landsliðið hjá monnum og fáa eisini atgongumerki til landsdystirnar í januar 2022.

Soleiðis gert tú

Tú kanst antin gera ein stuttan film, har tú fortelur, hví tú ynskir at vinna, ella gera tað skrivliga.

Les meira og send inn á
banknordik.fo/hondboltur

Meira enn ein banki

Vit raka málið!

Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM

ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
Flytur teg frameftir.

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

Bilasølan
Vegurin Langi 43, 359700

NORÐOYA SPARIKASSI

Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging

Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo ns.fo

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN

FAROE SHIP

1	Rúna Jógvansdóttir Larsen
2	Elsa Egholm
5	Vár Bentsdóttir Zachariasen
6	Bjørk Brimnes
7	Maria Halsdóttir Weyhe
8	Karina Eysturtún Rubeksen
9	Brynhild Pálsdóttir
10	Eva Barba Arge
12	Alda av Skarði
14	Inga Maria Joensen
17	Lív Bentsdóttir Zachariasen
18	Rannvá Olsen
19	Guðrið á Borg
25	Sára Jacobsen
28	Lukka Arge
77	Jana Mittún

Venjari:	Mark Marcher Lausen
Venjari:	Ingi Olsen
Liðleiðari:	Sunniva Bogadóttir
Málmansvenjari:	Jens á Skipagøtu
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen

sms

SMS KAPPINGIN

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	**H71**	**11**	**338**	**263**	**75**	**21**
2.	Kyndil	11	318	249	69	17
3.	Neistin	12	313	271	42	16
4.	Stjørnan	12	360	287	73	14
5.	Stíf	12	288	287	1	8
6.	VB	12	248	366	-118	2
7.	EB	10	184	326	-142	2

1	Ári Egason Dam
2	Sveinur Olafsson
5	Pauli Mittún
8	Pætur Thomsen
9	Jón Rói Mohr Høgnesen
10	Djóni Gaard Joensen
11	Hans Kári Hansen
16	Pauli Jacobsen
18	Sakir T. Frýdal
23	Emil Svoldgaard
24	Niklas H. Højgaard
26	Janus Dam Djurhuus
28	Rói Ellefsen á Skipagøtu
30	Poul Símun í Garði
39	Rókur Ziskason
45	Peter Krogh

Venjari:	Simon Olsen
Venjari:	Petur Mittún
Málmansvenjari:	Jens á Skipagøtu
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen
Liðleiðari:	Petur O.Sivertsen

BURN
FITNESS

BURN KAPPINGIN

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	**H71**	**13**	**411**	**305**	**106**	**22**
2.	Kíf	12	330	303	27	18
3.	Víf	13	372	343	29	14
4.	Team Kl.	12	332	354	-22	9
5.	Stíf	13	358	417	-59	9
6.	Neistin	11	313	324	-11	8
7.	Kyndil	12	283	353	-70	6

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til *HITA*
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

Mynd: Gudmund Helmsdal

LAIDERZ

Fokus på sportsfaciliteter

HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

JUTA MASTER 40/200 á EL25

www.laiderz.dk

Mynd: Álvur Haraldsen

HILMAR JAN HANSEN

KVINNURNAR SPÆLA ÚTI FYRST

Fýra teir fyrstu dystirnir í EHF Europa Cup hjá okkara kvinnum vóru allir í Føroyum, men ikki eydnaðist at fáa eina líknandi avtalu við serbiska mótstøðuliðið í áttandapartsfinaluni, so hesaferð verður útidystur fyrst í Serbia 9. januar og síðani heimadystur í Høllini á Hálsi leygardagin 15. januar klokkan 14.00.

Eftir fyrst at hava vundið burtur úr norður-makedonska WHC Cair úr Skopje við tilsamans 25 málum og síðani smurt sveitsiska Spono Eagles av við átta málum, er H71 nú millum 16 tey bestu liðini í EHF Europa Cup í ár og fyrireikar seg nú til áttandapartsfinalurnar.

Mótstøðuliðið gjørdist serbiska ZRK Naisa Nis, sum í løtuni er fjórðfremst í bestu serbisku deildini, men eitt sindur aftan fyri trý tey fremstu. Serbiska mótstøðuliðið kann væntast at vera munandi størri mótstøða enn hini bæði liðini, H71 hevur sligið út.

Ímóti WHC Cair og serstakliga ímóti Spono Eagles høvdu okkara venjarar, Ingi Olsen og Mark Lausen-Marcher fyrireika kvinnurnar meistarliga væl, so nú er spurningurin, hvussu verður í áttandapartsfinalunum:

– Vit gera upp á sama máta, sum vit hava gjørt higartil, at vit fyrst og fremst hyggja at, hvat mótstøðuliðið hevur at koma við. Tað hevur riggað væl, so tað gera vit sjálvandi aftur hesaferð, sigur annar av venjarunum, Mark Lausen-Marcher.

– Enn havi eg ikki sæð nakrar dystir hjá teimum, men eg havi samlað teirra dystir í ár saman, og tað tilfarið skal so klippast saman, áðrenn vit fara at hyggja

Mynd: Álvur Haraldsen

nærri at, hvussu tær spæla. Men longu nú kann eg siga, at her er talan um ein heilt annan spælistíl, enn hini bæði liðini høvdu.

Gera arbeiðið liðugt

Umframt sjónbandaðar dystir, hava venjararnir savnað saman ymsar upplýsingar, teir eisini kunnu brúka, men teir ætla ikki at seta seg við tilfarinum, fyrr enn landskappingardysturin ímóti EB er fingin frá hondini.

– Frá 27. januar er europeiska avbjóðingin tað einasta, vit hugsa um, og tá hava vit tvær vikur til tann fyrra dystin. Ingi og eg fyrireika okkum á hvør sínum fokusøki og so samla vit alt saman, so vit hava eina samlaða ætlan fyri, hvussu vit skulu spæla teir báðar dystirnar ímóti ZRK Naisa Nis, sigur Mark.

– Vit mugu rokna við harðari mótstøðu enn higartil, men hóast tað kann vera torført at spæla seg í fjórðingsfinaluna, so trúgva vit upp á tað. At vit spæla útidystin fyrst, hevur einki at siga fyri okkum, tí vit fara heilhjartað í gongd við báðar dystirnar, men vóna sjálvandi, at støðan eftir fyrra dystin er so góð, at vit kunnu gera arbeiðið liðugt á heimavølli og koma víðari.

ZRK Naisa Nis er annars stovnað í 1969 og besta tíðarskeiðið higartil var í nullunum, tá ið tað millum annað eydnaðist at vinna EHF Challenge Cup í 2007 og serbisku steypakappingina tvær ferðir, í 2008 og 2009.

Higartil í EHF Europa Cup-kappingini í ár hevur ZRK Naisa Nis vunnið samanlagt 50-43 á HB Dudelange úr Luxembourg. Báðir dystirnir vórðu spældir í Nis, og vóru úrslitini ávikavist 25-22 og 25-21.

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur

Follow us

Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399

the athlete's foot

Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD

hiddenfjord.com

REINAR TENN BRENNA IKKI



OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Tak appina niður her

Fyll á og koyr víðari

effo appin

ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo

DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO